# VARPIÐ

Canal+Film1
Leygardagin kl. 19.00

## Tara Road

**Sonurin hjá amerikonsku Marylin er júst deyður í eini vanlukku. Ria, sum býr í Dublin, hevur júst mist mannin, sum er rýmdur. Báðar er tær í svárari sálarkreppu og hava tørv á eini broyting. Av tilvild hittast tær, og so gera tær av, at tær báðar skifta um bústað.**



DR2 • Mikudagin kl. 22.50

## Tavshed er ikke guld

**Kanst tú liva sum lesbisk, tá tú er fastgrógvin í ortodoksa ella óortodoksa jødiska samfelagnum í Jerusalem. Svarið er eitt dundrandi nei!. Heilaga skriftin bannar homoseksualiteti, og hetta kann als ikki diskuterast. Tær triggjar, Yehudit, Ruth og Miriam Ester verða róptar syndarar, men hvør í sínum lagi stríðast tær fyri rættinum til sín seksualitet, uttan at tær tó vilja sleppa átrúnaði sínum. Serliga trupult er tað hjá Ruth og Miriam Ester, sum eru giftast og mammur at ávikavist seks og tíggju børnum.**



TV3 • Týsdagin kl. 19.00

## Med kniven for struben

**Í seinasta partinum av væl umtóktu røðini gongur leiðin til Havnar og Rio Bravo. Hóast nýggir eigarar tóku við fyri trimum árum síðani, so er at kalla eingin broyting í mun til tað, sum var, tá matstovan læt upp á sinni. Búffar og bernaisesauce tykjast ikki longur vera tað, sum føroyingar vilja hava. Bo Bech sær skjótt, at her skulu stórar broytingar, har hann skal beina pulvursauce og –suppu burtur, og spurningurin er, um føroyingarnir eru til reiðar at geva danska stjørnukokkinum valdið.**



TV3+ • Mikudagin kl. 20.15

## Champions League frá San Siro

**AC Milan-Man Utd**
**Á Old Trafford reistist Manchester í einum ótrúligum dysti, sum teir við einum máli í yvirtíðini vunnu við 3-2. Tað gevur teimum fyrimunin undan seinnu hálvfinaluni, men hesin er tó so lítil, sum tilber. Og alt bendir á, at tað als ikki verður nóg mikið hjá gestunum, um teir bara leggja seg aftur at verja.**


Televarpið

Fleiri rásir - einki roks



Sosialurin

FRÍGGJADAGUR 13. APRÍL 2007


**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**